**Í/F Sjótrygd - Navit**
P. O. Box 225
FO-110 Tórshavn
phone +298 508200

**Løgtingsins Vinnunevnd**
110 Tórshavn

Tórshavn, 19. mars 2019

Viðvíkjandi uppskotið nr. 109/2018 um at betra fortreytirnar hjá ungum at sleppa til skips, og uppskotið nr. 156/2018 um ókeypis trygdarskeið.

Í samband við nevndu uppskot hava vit hesar viðmerkingar.

Vit hava eitt vinnuligt virkið, sum í eini 12 ár hevur umframt ymisk maritim skeið, eisini veitt trygdarskeið til føroysk og útlendsk sjófólk.

Uppskot nr. 109/2018 leggur upptil, at tey ungu, sum fyrstu ferð skulu til skips (mynstra), skulu sleppa undan trygdarskeiði áðrenn farið verður avstað.
Vit hava arbeitt við trygd á sjónum í nógv ár – fyrst umleið 15 ár sum lærarar á Føroya Sjómannsskúla (Vinnuháskúlanum) og síðan í egnum virki. Vit vilja avgjørt ráða frá at trygdarskeiðið verður umlopið, tá farið verður til skips fyrstu ferð.
Hinvegin skuldi borið til at býtt 5 daga skeiðið upp í t.d. tveir partar, soleiðis at skilja at viðkomandi brúkar umleið 2 dagar til tað, sum hevur størstan týdning í samband við sjálva trygdina – bæði ta persónligu og felagstrygdina umborð.
Seinni partur av 5 daga skeiðnum kundi so hóskandi verið tikin innan 1 ár frá fyrsta part.

Í samband við bæði uppskotini skulu vit vísa á, at eini 80% av luttakarunum, vit hava á trygdarskeiði, eru sendir av arbeiðsgevarunum, soleiðis at skilja, at bert umleið 20% gjalda sjálvir fyri skeiðið.

Annars kunna vit upplýsa, at Sjónám hevur í nógv ár fingið eina árliga játtan uppá 1,5 mió. kr, júst til hetta endamál. Sí viðmerking fyri fíggjarlógina 2016, sum er viðløgd. Í 2019 er hendan viðmerking burtur, men játtanin er tann sama. Hendan játtan er beinleiðis í kapping við virki okkara. Hóast vit í fleiri umførum hava víst á hendan skeivleika yvirfyri Løgtinginum, kappingarráðnum og LUM, og hava fingið rætt, er einki hent.

Um meira stuðul skal veitast til trygdarskeið, vilja vit fegnir verða líkastillaðir við teir almennu stovnarnar, og ikki sum í dag, har tað almenna "dumpar" prísin við skattgjaldarans peningi.

Vit eru sinnaðir at møta í Vinnunevndini um áhugi er fyri tí.

Vegna
Sjótrygd - Navit

Lassi Borðoy og Sjúrður Guðjónsson

**Í/F Sjótrygd - Navit**
P. O. Box 225
FO-110 Tórshavn
phone +298 508200

Úr fíggjarlógini frá 2016. Í 2017, 2018 og 2019 er hendan viðmerkingin burtur, menn játtanin tann sama.

*"23. Sjónám (Trygdarmiðstøðin og skeiðsvirksemi) varð stovnað í 1999 sum sjálvstøðugur stovnur til at geva sjómonnum skeið og undirvísing í trygd á sjónum sambært Ll. nr. 63 frá 3. juli 1998 um manning av skipum. Trygdarskeiðini eru sambært ásetingunum í STCW - 75 sáttmálanum við seinni broytingum. Sambært kunngerð nr. 20 frá 22. mai 2010 um sjóvinnubrøv og útbúgvingarkrøv til sjófólk, skulu øll, sum mynstra við føroyskum skipum, hava staðið góðkent trygdarskeið. Játtanin verður veitt, so stovnurin kann veita skeið innan trygd á sjónum fyri ein lægri kostnað. Hetta tí, at landsstýriskvinnan metir, at kostnaðurin ikki skal vera ein forðing fyri, at so nógv sum gjørligt taka lógarkravda skeiðið innan trygd á sjónum.*
*Gjøld fyri trygdarskeið eru ásett í kunngerð nr. 100 frá 12. oktober 2012 um gjald fyri skeið innan trygda á sjónum. Munur verður gjørdur á gjaldinum, sum sjófólk rinda og tí, sum fólkaskúlanæmingur/sjóvinnubreyt rindar. Atlit verður sostatt tikið til, at tað skal verða møguligt hjá næmingum, eitt nú í 10. flokki og á sjóvinnubreyt, at fáa undirvísing í trygd á sjónum fyri ein rímiligan kostnað."*